Suðuroyingar, sum vilja sleppa heim:

# Mugu gjalda 600 krónur fyri túrin

VERKFALL
*Ragnhild Ellingsgaard*

Suðuroyggin merkir serliga sviðan av verkfallinum hesar dagarnar. Sjálvt um syrgt er fyri mjólkaflutningi til oynna, so skipar eingin fyri nakrari sjóvegis farleið til suðuroyingar sjálvar. Av tí sama hava teir einans ein møguleika, um teir hava ørindir aðrastaðni, ella teir skulu heim aftur á oynna eftir loknan arbeiðs- ella skúladag. Hesin møguleiki umfatar eina ferð í tí høga saman við tyrluni hjá Atlantic Airways, og sum vit hava skilt, er stórur eftirspurningur eftir at sleppa við.

Vit fóru ein túr niðan á tyrlupallin, har vit fingu eitt prát við nøkur av ferðafólkunum.

### 600 krónur

Inni í lítla húsinum á tyrlupallinum sita 3 mans og bíða. Teir eru allir frá Suðuroynni, og høvdu ætlað sær heim hósdagin, sama dag sum verkfallið byrjaði. Men illa gekst. Smyril gavst við siglingini, longu áðrenn lýst varð við nøkrum verkfallið, og tí høvdu teir ongan møguleika fyri at sleppa heim til familjuna, sum bíðaði heima.

Tí ringdu teir til Tyrlutænastuna at vita, um tyrlan gjørdi nakrar eykatúrar til Suðuroynna, meðan verkfallið var.

– Svarið, vit fingu, var, at tyrlan kann gera nakrar leigutúrar, meðan verkfallið stendur á. Tey høvdu ein lista, sum man kundi skriva seg á, og so skipaðu teir fyri túrum, so leingi tørvur var á tí. Eg skrivaði meg á listan, og fekk at vita, at eg stóð sum nummar 46. Tí slapp eg ikki við fyrr enn nú, greiður tann eini maðurin frá.

Men prísurin fyri at sleppa heim er ikki tann sami, nú verkfallið er. Tey, ið ynskja at nýta tyrluna, mugu gjalda heilar 600 krónur hvør ,fyri at sleppa við.

– Nei, tað er ikki ein stuttligur prísur, sigur ein annar maður.

– Men hetta er einasti møguleikin, vit hava fyri at sleppa heim. So vit noyðast at gjalda, sjálvt um hetta kanska virkar órímiligt.

Á tyrlupallinum fáa vit eisini at vita, at høgi prísurin kemst av, at talan ikki er um vanliga rutuflúgving, men um leigutúrar.

– Tað kostar 18.000 krónur at hava tyrluna á flogi í ein tíma, og hetta má fáast inn aftur onkran vegin, verður svarað, tá vit spyrja um orsøkina til tann høga prísin.

### Langur bíðilisti

Lítla húsið á tyrlupallinum gerst alsamt meiri trongt, meðan vit sita har. Fólk koma dettandi inn á gólvið alla tíðina. Onkur hevur teknað seg til leigutúrin, sum skal avstað lítla løtu eftir, og onkur annar kemur fyri at vita, um nakar møguleiki er fyri at sleppa við, sjálvt um hann ikki hevur sett sítt navn á langa bíðilistan.


Henrik Old var ein av teimum, sum fríggjadagin máttu nýta tyrluna sum flutningsleið

Tyrlan skal vera fullsett, um nakar túrur skal gerast. Men enn mangla tvey av teimum 10, sum skuldu verið við á hesum túrinum. Ein ungur drongur fær at vita, um hesi tvey ikki møta upp, so kann hann sleppa við ístaðin. Og hann gerst sjálvandi fegin um tíðindini, nú sleppur hann frá at liggja fastur í Havnini, men kann fara heim til familjuna.

Um hann heldur hevði valt at ringt til Tyrlutænastuna, so hevði hann endað aftast á tí langa bíðilistanum, og so hevði hann uttan iva skula bíða fleiri tímar, áðrenn Tyrlutænastan ringdi aftur at geva boð um, nær hann kundi sleppa suður.

– Vikuskiftið kemur nú, og sjálvandi vilja allir suðuroyingar sleppa heim at halda frí, letur í tí eina manninum, meðan prátið gongur um hendan vælsignaða bíðilista, sum nú er vorðin teirra billett fyri at sleppa heim.

### Líkist ongum

Meðan vit sita har, kemur Henrik Old eisini inn á gólvið. Hann mátti av oynni í arbeiðsørindum, men nú vil hann sleppa heimaftur.

– Tá Smyril ikki siglur, so má onkur onnur loysn finnast, sigur hann, tá vit spyrja, um 600 krónur ikki eru ein øgiliga høgur prísur fyri at sleppa heim.

– Antin betalur tú prísin, ella verður tú sitandi eftir. So einfalt er tað,leggur ein annar afturat.

Henrik greiður annars frá, at teir í Landsstýrinum leingi hava verið greiðir yvir, at hetta verkfallið fór at koma.

– Sum nú er, fáa skipararnir umborð á strandfaraskipunum ikki nóg góða løn fyri tað arbeiði, sum teir gera. Ein skipari skuldi jú helst verið tann hægst lønti umborð, men soleiðis er ikki. Í veruleikanum eru lønarviðurskiftini heilt burturvið, og yvirmenninir umborð verða undirvurderaðir. So tað er púra beint av teimum at gera vart við hetta, heldur Henrik.

Henrik leggur eisini afturat, at tað líkist ongum, at strandfaraskipini gevast við at sigla, longu áðrenn verkfallið er lýst at verða. Bæði Smyril, Scania og onnur skip avlýstu túrar, áðrenn ferðafólkini høvdu nakran varhuga av, at verkfallið fór at henda so skjótt.

– Og tað líkist ongum sum helst. Strandfaraskipini góvu við hesum boð um, at tey longu áðrenn verkfallið høvdu tikið støðu, og tað eigur ikki at henda, greiður Henrik frá.

– Tí eigur landsstýrismaðurin í hesum málum at finna fram til, hvør skipaði fyri, at skipini góvust at sigla. Hesin persónur eigur eftir mínari meting ikki at halda fram í starvi sínum, tí sjálvandi skulu skipini sigla eftir vanligu ferðaætlanini, so leingi einki verkfall er lýst, sigur Henrik, áðrenn hann fer niðan móti tyrluni, sum skal flúgva hann heim til Suðuroynna.

# KT-messan glíðandi byrjan

**Fyrsta KT-messan av sínum slag gekk uppá stás, tá 600 KT-fólk savnaðust í Norðurlandahúsinum**

MESSA
*Heri á Rógvi*

Tað var at kalla fullsett, tá Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum setti KT-messuna, KT 2002 fríggjamorgunin.

Fyrireikingarnar hava tikið langa tíð, og tað hevur verið nógv at gjørt og fyrireika til hesa fyrstu messuna av sínum slag í Føroyum. Tað var eisini stórur áhugi. 600 fólk hava teknað seg til tann fyrsta dagin, sum er ein sokallaður Business to Business dagur, har tað fyri tað nógva eru fólk úr vinnuni í luttaka.



*Nógv fólk savnaðus í Norðurlandahúsinum til tað fyrstu KT-messuna av sínum slag í Føroyum.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Henda fyrsta dagin vóru framløgur og fyrilestrar á skránni. Í dag, leygardagin, vera aðrir fyrilestrar og framløgu at síggja og hoyra í Norðurlandahúsinum og Útvarpshøllini.

**Skráin fyri leygardagin 20. apríl er hendan:**

| | |
|---|---|
| Kl. 10.00 – 18.00: | Framsýningin er opin |
| Kl. 10.30 – 18.00: | Framløgur hvønn hálva tíma í show-rúmi |
| Kl. 10.30 – 11.15: | Fyrilestur í Útvarpshølllini um Windows XP v/Microsoft Danmark |
| Kl. 11.30 – 12.15: | Fyrilestur í Útvarpshølllini við Petur Zachariassen frá Fróðskaparsetrinum |
| Kl. 13.30 – 14.45: | Fyrilestur í Útvarpshølllini við umboðum frá Mentamálastýrinum |
| Kl. 15.00 – 15.45: | Fyrilestur í Útvarpshølllini um Windows XP v/Microsoft Danmark |
| Kl. 16.30 – 17.15: | Fyrilestur í Útvarpshølllini við umboðum frá Vinnumálastýrinum |
| Kl. 17.30 – 17.45: | Esbern Hansen formaður í KT-felagnum tekur samanum |
| Kl. 18.00: | Stevnan endar |
| Kl. 19.30: | Gallaveitsla á Hotel Føroyum |



# Nú vilja vit hava frið

**–Vit hava verið ov linir hesi seinastu árini, men nú skulu lønirnar upp á eitt sømiligt støðið,sigur Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

–Nú skulu lønirnar hjá yvirmonnunum við skipunum hjá landinum fáast í rættlag. Tí nú skulu vit hava frið.

Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum ætlar sær ikki at lata sær hvat sum helst lynda, nú yvirmenninir á skipunum hjá landinum eru farnir í verkfall.

Á miðdegi hósdagin slitnaði semingsroyndirnar og sostatt eru yvirmenninir á strandfaraskipunum, á vaktarskipunum og á Magnusi Heinasyni, farnir í verkfall. Hann sigur, at nú er tað komið hartil, at hýrurin umborð á skipunum er so vánaligur, at tað er ikki livandi umborð longur.

– Tað kemst av, at lønirnar hjá yvirmonnunum eru so lágar, at munurin niður til manningina annars, er alt ov lágur, samstundis ið lønin sum heild, er ov lág.

Annars heldur hann, at tað er nokk so langt ímillum partarnar.

– Vit hava kravt, at skiparin á vaktarskipunum skulu hava 30.000 krónur í løn frá 1. mars í ár og 31.712 krónur frá 1. mars komandi ár.

– Eftir semingsuppskotinum, sum vit vrakaður, skuldi hann fáa 28.528 krónur. Òsemjan er sostatt um munin har ímillum.

Viðvíkjandi Strandferðsluni, er støðan eitt sindur øðrvísi.

– Í seinastuni er ein stýrimaður afturat komin umborð á summi av skipunum. Vit hava kravt, at stýrimaðurin, sum er umborð, skal vera løntur á sama støði, sum nú, men tað nýggi stýrimaðurin skal vera hægri løntur, samstundis sum skiparin eisini skal hava hægri løn.

– Tað vil Fíggjarmálastýrið ikki góðtaka, men har eru vit yvirhøvur ikki til til at vika, sigur Ellintur Abrahamsen.

Samstundis ætla vit at útvega skiparunum á teimum smærru strandfaraskipunum upp.

– Men tað vil Fíggjarmálastýrið ikki góðtaka, uttan so, at tað verður tikið burturav samlaðu lønarútreiðslunum, tvs, at yvirmenninir á hinum bátunum skulu betala tað, men tað góðtaka vit als ikki, sigur Ellintur Abrahamsen.

Annars viðgongur hann, at støðan er eitt sindur fløkjaslig, tí í hesum samráðingunum hevur bæði verið tosað um sáttmálaløn, fastaløn og tænastumannaskipan, men so endaði tað við ongum.


*– Vit lata okkum ikki meiri lynda, tí nú skal lønin hjá yvirmonnum við landsins skipum fáast i rættlag, sigur Ellintur Abrahamsen. Men tað gekk ikki og hósdagin varð verkfall.*

Hann vísir annars aftur, at tey skulu hava kravt yvir 70% í løn.

– Tað vit gjørdu í fyrstuni, var at samráðast um ein sáttmála, har vit brúktu uppskotið hjá nevndini, ið Løgtingið setti at áseta lønina hjá monnunumm á Brimli, sum grundarlag.

– Men tað sleptu vit sum samráðingarnar gingu og hava ongantíð tikið tað framaftur.

Nú løgtingsval er í hondum, eru tit undir illgruna fyri at hava lagt serliga hart trýst á, fyri at fáa ein góðan sáttmálað vónini um, at Landsstýrismaðurin ikki skuldi tora at verkfall verður nú?

– Tað er ikki rætt. Okkara krøv eru heilt realistisk og hava onki við valið at gera. Vit kunnu ikki gera við, at valið er nú.

Tit hava eisini ført fram, at tit eru afturútsigldir í fleiri ár. Er tað realistiskt at krevja alt tað mista innaftur í einum?

– Eg kann gott taka á meg, at vit hava verið ov linir hini árini. Men tað hevur verið tí, at vit hava mett, at vit hava havt so vánalig kort á hondini og vit eru ongan veg komin. Men vit hava miðað ímóti, at vit skuldu fáa eina hækking, tá ið nýggj skip komu, og síðani hava vit latið okkum lynda at bíða til tað jendi.

– Tá ið so Teistin og Brimil komu, kom røringur í, men tá bar heldur onki til. Men tað skal enda nú, tí nú skal lønin í rættlag, sigur Ellintur Abrahamsen.

– Tað verður nógv tosað um, hvussu stór krøvini eru. Men tað verður onki tosa um, hvussu høg lønin er og tað er hetta, tað snýr seg um, leggur hann afturat.

## Hesi eru krøvini

Krøv frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag fyri vaktar- og bjargingarskipini, áðrenn semingsuppskotið frá semingsmonnunum við støði í tænastumannalógini kom:

**Krøv skipari:**

| | |
|---|---|
| 01.03.2002: | Skipari skal verða løntur í lønarflokki 34.1. Haraftrat skal hann hava eina viðbót, ið er munurin millum 30.000 kr. og lønarflokk 34.1: 28.528,08 kr., tvs, 1.471,92 kr. |
| 01.03.2003: | Skiparin skal vera løntur í lønarflokki 35.1 ( 31.712,68 kr. ). |

**Krøv yvirstýrimaður**

| | |
|---|---|
| 03.02.2002: | Yvirstýrimaðurin skal vera løntur í lønarflokki 31.1. ( 24.661,96 kr.) Haraftrat skal hann hava eina viðbót, ið er munurin millum ( 24.661,96 kr.) og lønarflokk 32.2 ( 26.903,39 kr. ). |
| 01.03.2003: | yvirstýrimaðurin skal vera løntur í l. fl. 33.1. ( 28.184,76 kr. ). |

**Krøv 1.stýrimaður.:**

| | |
|---|---|
| 01.03.2002: | 1.stýrimaður vera løntur í lønarflokki 29.1 ( 24.361,39 kr. ). Haraftrat skal hann hava eina viðbót, ið er munurin millum (24.361,39 kr.) og lønarflokk 32.1 (25.981,52 kr. ) t.v.s. 1.620,13 kr. |
| 01.03.2003: | skal hann vera løntur í lønarflokki 32.2 ( 27.575,98 kr.). |

Semingsuppskotið, ið er gjørt við støði í tænastumannalógini er hetta:

Skiparar og stýrimenn verða eftir starvsaldri flokkaðir sambært lønartalvuni fyri tænastumenn soleiðis:

Skipari – 34. lønarflokkur umframt starvsaldur.
34.1 (28.528,08 kr.)

Yvirstýrimaður – 30. lønarflokkur umframt starvsaldur:
30.1 (24.241,18 kr)
30. 2 (25.107,52 kr.).
1.(25.981,52 kr.).

1. stýrimaður – 27. lønarflokkur umframt starvsaldur:
27.1 (21.853,56 kr.).
27.2 (22.635,13 kr.).
27.3 (23.379,99 kr.).
27.4 (24.241,18 kr.).

Skipara og Navigatørfelagið sigur, at so kann ein og hvør síggja, hvussu langt er ímillumn partarnar.

# Eg latið meg ikki kroysta

**– Eg fari ikki at sleppa endanum fyri tað um løgtingsval er um eina góða viku, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum.**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Tað eri framvegis eg, sum hava ábyrgdina av landsins fíggjarmálum. Og eg fari ikki at sleppa endanum, fyri tað, um løgtingsval er fyri durum.

Karsten Hansen heldur, at krøvini, sum Skipara- og Navigatørfelagið hevur sett fram um lønina hjá yvirmonnunum á landsins skipum, vóru so órealistisk, at tey lukta.


*Krøvini frá Skipara- og Navigatørfelagnum lukta av, at tað er val í hondum. men støðan er greið og tí endaði tað í verkfalli, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður.*

–Tað stutta av tí langa er, at Skipara- og Navigatørfelagið hevur enn somu krøv, sum teir settu fram, tá ið samráðingarnar byrjaðu í mars mánaða. Við øðrum orðum vilja teir ikki samráðast.

Hann sigur, at eitt nú hevur felagið kravt, at lønirnar hjá skiparanum á Tjaldrinum og Magnus Heinasyni, skuldi hækka 72% og lønin hjá skiparanum á Brimli skuldi hækka góð 60%.

– Í semingsuppskotinum, sum vit góðtóku, skuldi viðbótin hjá skiparin á Smyrli hækka úr 2.400 krónum um mánaðin, upp í 7.400 krónur, umframt vanligu lønarhækkingina, men tað felagið vera alt ov lítið. Karsten Hansen heldur, at tað sigur seg sjálvt, at tað ber ikki til at ganga við til slíkt.

– Vit hava gjørt sáttmála við ein hóp av feløgum og har er lønarhækkkingin um 9,5%.

– Tí er tað heilt ómøguligt at góðtaka krøvini frá Skipara- og Navigatørfelagnum, tí hevði verið heilt óforsvarligt mótvegis hinum feløgunum.

Nú er løgtingsval í hondum. Hevur tað merkt samráðingarnar?

– Tað er heilt týðiligt, at Skipara- og Navigatørfelagið hevur havt eina sannføring um, at eg fór ikki at tora at standa ímóti av tí at val er nú. Tað er heilt týðiligt, at tað var við í metingunum.

– Men eg eri settur at hava ábyrgd av fíggjarpolitikkinum og eg kann ikki sleppa endanum, bara tí, at tað er val. Tað er ikki ein gávuhandil, eg umsiti.

Hann sigur, at lønirnar hjá alment settum er ongantíð hækka so nógv, sum hesi seinastu árini og tað er ein ásannan av, at hon var ov lág. Tað er komið rættiliga langt áleið á hasum økinum, men máti skal vera við, tí tað ber ikki til at avlaga almenna lønarlagið so nógv, sum Skipara- og Navigatørfelagið legði upp til.

Karsten Hansen sigur, at eftir semingsuppskotinum skuldi lønarhækkingin vera áleið tann sama sum hjá hinum feløgunum, umframt at viðbøturnar, eitt nú til skiparan á Smyrli, skuldi hækka.

– Tað var eitt uppskot, vit góðtóku og teir vrakaðu, teir hava kravt alt ella onki, sigur Karsten Hansen.

Hann leggur afturat, at hann kann ikki hugsa sær, at nøkur politisk stig verða tikin fyri valið.

Karsten Hansen, landsstýrismaður, harmast almikið um, at ein tílík støða skal taka seg upp – ikki minst í einum tíðarskeiði beint upp undir val, har landsstýrið virkar sum eitt avgreiðslulandsstýri inntil nýtt landsstýri er skipað.

– Eg havi roynt at gjørt alt, sum er møguligt, sakliga og reelt. Eg havi støðugt roynt at betra og loysa teir mongu trupulleikar, sum hava ligið á láni í mong harrans ár hjá ymsu fakbólkunum. Og sjálvandi eisini í hesum føri. Tað léttasta hjá mær hevði sjálvsagt verið at kasta ábyrgdina frá mær, nú stundar til val. Men mín ábyrgd er, at øll feløg og allir fakbólkar fáa somu sømdir við atliti til teirra serligu umstøður. Um viljin er frá báðum pørtum, so dugi eg ikki at síggja forðingarnar fyri eina semju, sigur Karsten Hansen.